Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 26. februar 2021
Mál nr.: 20/00026
Málsviðgjørt: AE

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 2. Landsbanki Føroya er undir leiðslu av einari nevnd og einum stjóra. *Stk. 2.* Nevndin er skipað við 7 limum og 7 varalimum, sum landsstýrismaðurin velur fyri eitt 3 ára tíðarskeið og kunnu veljast aftur í mesta lagi 4 ferðir. Tá limur ikki hevur sitið í nevndini í eitt 3 ára skeið, kann hann tilmælast aftur, á sama hátt sum aðrir limir. Limirnir verða tilnevndir soleiðis: 1) 2 limir og 2 varalimir verða tilnevndir av landsstýrismanninum, 2) 2 limir og 2 varalimir eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya, 3) 1 limur og 1 varalimur eftir tilmæli frá arbeiðsgevarafelagnum, 4) 1 limur og 1 varalimur eftir tilmæli frá fakfeløgunum, og 5) 1 limur og 1 varalimur eftir tilmæli frá Kommunufelagnum. *Stk. 3.* Limirnir í nevndini skulu hava fakligar førleikar innan eitt ella fleiri av hesum førleikaøkjum: búskaparfrøði, fígging og kredittmeting, serligt innlit í	Løgtingslógaruppskotið 1. Í § 2, stk. 2 verður sum nýggjur tekstur sett:" Landsbanki Føroya er undir leiðslu av eini nevnd og einum stjóra. Nevndin er skipað við 5 limum, sum landsstýrismaðurin velur í eitt 3 ára tíðarskeið og kunnu teir veljast aftur í mesta lagi 4 ferðir. Tá limur ikki hevur sitið í nevndini í eitt 3 ára skeið, kann hann veljast av nýggjum. Landsstýrismaðurin setir nevndarlimirnar eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya. Landsstýrismaðurin velur formannin." 2. Í stk 3. verður sett inn fremst: "Í minsta lagi 3 limir skulu vera búskaparfrøðingar við

føroyska fíggjargeiran ella búskapin í Føroyum. Nevndarlimirnir skulu samanlagt fevna um allar hesar førleikar. *Stk. 4.* Um so er, at tey innstillaðu ikki hava ein nóg breiðan ella nøktandi fakligan førleika, kann landsstýrismaðurin biðja um nýggj tilmæli. *Stk. 5.* Persónar, ið javnan kunnu væntast at verða ógegnigir í málsviðgerðini hjá nevndini eftir reglunum í kapitli 2 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg, kunnu ikki vera limir í nevndini.	kandidatútbúgving frá hægri lærustovni." 3. Stk 4. verður strikað 4. Sum stk. 6 verður sett: "Limirnir í nevndini kunnu ikki starvast í landsstýrisfyrisitingini ella Landsbanka Føroya".
Stk. 6. Nevndin skipar seg sjálv við forkvinnu ella formanni og næstforkvinnu ella næstformanni. *Stk. 7.* Landsstýrismaðurin hevur rætt at luttaka á nevndarfundum	5. Stk 6. og 7 verða strikað í verandi lóg. 6. Í § 11 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:"*Stk. 2.* Tá umræður afturrindan ella endurfígging av landskassaláni, kann víkjast frá kravinum í stk. 1 fram til at næsta landskassalánið fellur til gjaldingar. Í slíkum føri skal landsins gjaldføri tó ikki minka niðurum 13%. av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna árið." 7. Stk. 2-4 verða eftir hetta stk. 3-5.
§ 17. Landsbanki Føroya verður stovnaður við 20 mió. kr. í fæi. *Stk. 2.* Fæið kann nýtast at javna inntøkur og útreiðslur í mun til virksemi landsbankans. *Stk. 3.* Fæið er uttanhýsis partur av landsroknskapinum, og virksemið er ikki tikið við á fíggarlóg. *Stk. 4.* Nevndin ger nærri reglur um, hvat fæið kann brúkast til.	8. § 17. Verður strikað
§ 18. Landsbanki Føroya er fíggjaður við játtan á løgtingsfíggjarlógini.	9. § 18. Stk 2 og 3 verða strikað.

Stk. 2. Landsbanki Føroya fær $4^{0}/_{00}$ av tí í § 11, stk. 2 ásettu upphædd fyri røkt av gjaldføri og skuld landsins. *Stk. 3.* Landsbanki Føroya kann hava inntøkufíggjað virksemi.	